Papcon er WC pappír og køksppappír úr bestu góðsku, framleitt í Føroyum

Papcon er bíligast og best á marknaðinum

papcon borgar fyri góðsku

# Gandakokkurin í Vestmanna

Júst fyri páskir hittu vit »kokkin« í Vestmanna Gundur Nielsen. Hóast ungur so er matgerðarkynstur hansara fullkomið, og boð eru eftir honum úr øllum landinum, tá eitthvørt serstakt skal búgvast til hátíðarborðini.

Eg havi síðan eg var stórur smádrongur havt hug til matgerð. So valið var lætt, tá eg úr 10. flokki skuldi kjósa mær læruplass. Væl fall í lag, Hotel Vágar søkti eftir kokkalærlingi. Eg søkti og fekk ja.

Fýra ára lærutíðina havi eg verið í Vágum og á kokkaskúlanum í Ålborg, hagar eg mátti, eftirsum vit enn ikki hava kokkaskúla í Føroyum.

Eina viku eftir seinasta skúla mín í Ålborg fekk eg prógvið sum fyrsti kokkur, útbúgvin í Føroyum.

Hevði fyri árum síðan sett mær fyri at fara undir egið matvøruvirki, sum eg fór undir góðan mánaða eftir sveinaroyndina.

Byrjað varð við at gera mat til útiarbeiðandi fólkið í bygdini. Eisini gjørdu vit portiónsmat til smærru trolbátarnar, sum helst kom væl við hjá teimum. Hesar tænastur standa við og vaksa, so tørvur er fyri ti í bygd sum okkara við nógvum útiarbeiðandi konufólki.

Eg havi havt rættiliga nógv arbeiði av veitslurættum bæði til Havnar, Vágarnar og bygdirnar nærindis. Og ynskini eru fjølbroytt, men so eisini so mikið meiri spennandi. Vilja fólk hava okkum at standa fyri øllum tí matliga, so gera vit eisini tað og verða á staðnum til seinasta mann.

Størsta brúdleyp vit matgjørdu til var í Klubbanum í Havn — umleið 400 fólk.

Annað eg fáist við er sundurliman og portiónsskering av stórdýrum.

Ætlanin hevur eisini altíð verið at framleiða lidnar rættir til handlarnar. Vit gjørdu nakrar royndir í fjør við ymiskum salatum v. m., men bar hetta seg illa vegna rávørutollin.

Í Vágunum lærdi eg at matskaffa flogførunum og eg eri spentur uppá ætlaða samstarvið við Sámal Bláhamar um matgerð til bussin Toru og møguliga aðrar við.

Arbeiðsumstøðurnar í løtuni eru vánaligar. Høllini eru smá og óhøgliga fyri í bygdini. Men ætlanir eru um at byggja av nýggjum. Við arbeiðsfólkinum á havnaøkinum og skipunum í huga hava vit heitt á kommununa um byggilendi á havnaøkinum, og vóna vit, at kommunan ber skjótt at, so vit kunnu verða til reiðar komandi vestanstevnu.

Føroya Bjór

Tórshavn tlf. 13434
Leirvík tlf. 43038
Klaksvík tlf. 55454
Tvøroyri tlf. 71025

SIÐAN 1888

# Tímaløntu á Landssjúkrahúsinum sent tinginum mótmæli

Krevja at frítíðarpeningur útgoldin í 84 verður hildin uttanfyri skattaavrokningarskipanina

**Mótmæli er soljóðandi:**


**Undirritaðu, ið eru meint rakt av nýggju skattainnkrevjingarskipanini, krevja at fritiðarpeningur, útgoldin í 1984, verður hildin uttanfyri avrokningarskipanina.**

**Lógin er hin sama fyri øll, og krevja vit ti somu sømdir sum tey, ið fingu útgoldna sín fritiðarpening áðrenn 1. apríl — ella sum tey, ið við eini fritiðarmerkjabók fáa peningin í hondina á einum posthúsi.**

**Í báðum førum verður fritíðarpeningurin hildin uttanfyri avrokningarskipanina.**

**Vit eru ikki ment at bera ta eyka byrðu, hesin ójavni elvir til, eina rúma tíð afturat.**

Mótmælið er undirskrivað av ikki færri enn av umleið 70 tímaløntum starvsfólkum á Landssjúkrahúsinum — hetta hóast, sum tað verður sagt í viðmerking, at brævið er skrivað og undirskriftirnar savnaðar um páskirnar, tá nógv av tímalønta fólkinum ikki var í arbeiði.



Tógvhandilin

igloo

Landavegur 2
tlf. 15264

MYNT-VASK

Jónas
Broncksgøta 34

Opið allar dagar
kl. 7—21
Sunnudag stongt.

## Vikarstarv

Søkt verður eftir 3 vikarum at starvast við Argja skúla skúlaárið 1984-85.

Umsøkjarar skulu helst kunna undirvísa í týskum og gentufimleiki.

Freistin at lata inn umsókn er 10. mai 1984.

**Skúlanevndin fyri Tórshavnar uttanbiggja kommunu**
Postboks 2000, Argir

Restorffs

Bryggjarí
tlf. 14728

svarar eisini aftan á kl. 17.

VIDEO-BOND

3 stk.
VHS-E180
SCOTCH
við 2 ára
ábyrgdarváttan

kr. 330/-
pr. stk. 130/-

Vinarligast send mær:
Navn
Bústaður
Postnr./bygd
stk. VHS-E180

LM-handilin
Vit gera hvat vit kunna — og kunna tað, vit gera! Tlf. 11220 Selumóstøðin

GITIÐ FYRI GÓÐAN SMAKK

FIRKLØVER

Vil tú hava tað besta-keyp Freia

UMBOÐ: FRANTS RESTORFF P/F

# Reytt 1. MAI-hald

Reytt 1. MAI-hald við sangi, tónleiki, lestri og felagssangi verður í Havn. Herman Oskarsson og Dánjal Christiansen flyta fram røður.

Stevnan fyri haldinum er henda:

- Fyri sosialistiskum arbeiðaraveldi!
- Gerið lokalu fakfeløgini til stríðsfeløg!
- Móti forfylging av fakligt og politiskt virknum!
- Kvinnustríð er stættarstríð — stættarstríð er kvinnustríð!
- Stuðlið ungdóminum í stríðnum fyri útbúgving og arbeiði!
- Loysing!
- Føroyar úr NATO — NATO úr Føroyum!
- Móti útbygging av Sodnfelli — Støðin skal burtur!
- Nei til EEC!
- Móti báðum risaveldunum USA og Sovjet!
- Stríð móti imperialismuni er leiðin til frið!
- Stuðlið øllum frælsisstríði í heiminum!

**1. MAI-bólkurin**